## DAGSINS MEINING

# P/F Landsvegastubbi

Tá undirsjóvartunnilin til Vágarnar var samtyktur, so var avgjørt, at landið skuldi stovnseta eitt partafelag, sum skuldi byggja og reka tunnilin. Hetta konseptið var fyrstu ferð, at vikið var frá prinsippinum um at landsvegir skulu fíggjast yvir skattin á einum samhaldsføstum grundarlagi. Vágatunnilin er partfíggjaður við brúkaragjaldi, uttan tó at landskatturin varð lækkaður, sum hann prinsipielt átti at gjørt.

Um oyggjarvegurin var fíggjaður eftir sama leisti, so hevði eingin havt ráð at koyrt á honum nakrantíð. Norðoyartunnilin er á veg, og um brúkarnir av hesum tunnli skulu gjalda líka stóran part av tunnilskostnaðinum, so verður dýrt at nýta hendan tunnil. Um ein framtíðar Sandoyartunnil, fyri ikki at tala um ein Suðuroyartunnil, skal fíggjast eftir sama leisti, so verður tað helst bíligari at fara til Danmarkar, enn at koyra ígjøgnum tunnilin.

Vit kunnu hyggja at P/F Vágatunnilin, sum eitt eksperiment. Hvussu er hetta eksperiment hyldnast? Tunnilin var gjørdur rættiliga skjótt, og er helst væl gjørdur, men hvussu logiskt er tað, at sama felag, sum stóð fyri byggingini skal reka tunnilin? Ein skipasmiðja byggir skip, men rekur tey ikki aftaná.

P/F Vágatunnilin vísti skjótt, at hetta felag ikki hevði nógv skil fyri, hvussu fólk ferðaðust. Ferðafólkatalið var kraftiga undirmett, hóast ferðslulop er eitt vælkent fyribrigdi, tá betringar í ferðslumøguleikum henda. Síðani var ein innkrevjingarskipan keypt, sum ongantíð riggaði. Hesir burturspiltu pengar hava ongar avleiðingar fingið. Heldur ikki tykist tað fáa nakrar avleiðingar, at man alment tosar um at kontakta bileftirlit í øðrum londum fyri at krevja inn gjald frá útlendskum bilum. Hevði man frammanundan ein varhuga av, at tað var innefektivt at hava eina umsiting fyri hvønn tunnil, so váttaði eitt slíkt útsagn henda varhuga.

Tað er at vóna, at man gongur burtur frá, at skattgjaldarin skal gjalda fleiri almennum feløgum fyri at gera sama slag av arbeiði. Vit hava Landsverk, ið viðlíkaheldur alt veganetið við undantak av Vágatunnilinum. Vit hava Strandferðsluna, ið krevur pengar inn, har fólk skulu gjalda fyri ferðing sjóvegis ella um land. Hví skulu vit hava eitt tunnilspartafelag, sum ger tað sama sum áðurnevndu stovnar? Um man fastheldur prinsippið um brúkargjald, so er upplagt, at hava manuella innkrevjing, sum eitt nú Strandferðslan kundi staðið fyri. Hetta hevði óivað verið bíligari, og er ein upplagdur kandidatur til vard størv hjá tí almenna.

Tað besta hevði sjálvandi verið at tikið alt konseptið um brúkaragjald á landsvegum til nýggja diskussión. Tað fer einki av politikarum, um teir viðganga, at brúkaragjald var ein feilur, og broyta kós. Hetta snýr seg ikki um Vágamenn fáa ella ikki, men um allar skattgjaldarar í Føroyum. Tí leggur man eitt prinsipp um brúkaragjald á landsvegum, so verður hetta fyri alt landið í framtíðini. Skatturin fer ikki at minka, hóast hetta, tí peningurin verður bara brúktur til okkurt annað. Er hetta ynski skattgjaldarans?

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar eru tær radikalu sjálvstýriskreftirnar?

**Abraham Mikladal**



**Hast verk er last verk, sigur orðatakið. Tí er tað sera ódámligt og ræðandi, at tvey álvarsmál nú skulu skundast ígjøgnum á tingið. Annað er "Uppskot til lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera" og hitt er "Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Lov om Færøerenes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler""**

Skundurin er so stórur, at tað helst ikki skal vera stundir til at lesa hvat stendur í hesum lógum, og enn minni at kjaka tað. Fleiri hava borði upp á mál, at her ruggar ikki rætt, og ógreiðan er so stór, at fleiri serfrøðingar í altjóða viðurskiftum ivast stórliga í, um hetta ikki er mønustingurin hjá sjálvbjargnis- og sjálvstýrisstríðið føroyinga, tey næstu 100 árini.

Alt sum er farið fram seinastu tíðina, fyrst allar hesar undirskrivingarnar og nú hesi lógaruppskot, sigur okkum, at her ruggar ikki rætt, okkurt liggur undir.

Ein lítil vón var, tá verandi samgonga var skipa, at fólkaflokkurin var við, hann mundi fara at tryggja at ongin vanlukka hendi á sambandsleið, men henda vón er so dyggiliga gjørd til skamma, tí fólkaflokkurin tykist vera ein sera líkasælur við spælari hjá sambands samgonguni. Hvar er tað radikala sjálvstýri?

Støðan í dag líkist óhugnaliga nógv støðuni um tað mundi, tá "loysing" hevði vunnið á fólkaatkvøðuni, og samráðingar vórðu tiknar upp av nýggjum við donsku stjórnina. Tá lat danska stjórnin gera eitt undirskjal nevnt "Motivering", sum donsku embætisfólkini høvdu við sær. Vit skulu minnast til, at tað um hetta mundi var alneyðugt hjá dønum at vinna sær undirtøku í Føroyum, men ikki minst at káva útyvir, ella leggja royktám útyvir tað beistagerð teir høvdu framt móti føroyska fólkinum, við ikki at viðurkenna úrslitið av fólka-atkvøðuni. Nú skuldi málið gloymast. Og hvør skuldi hjálpa. Jú, Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin.

Her er ein endurtøka burturúr hesum nevnda undirskjali, nevnt "Motivering": Kelda: Bókin "Kilder til Færøernes og Grønlands Historie".

"Med en tilstrækkelig fast, men samtidig rundhaandet Politik vil Lagtingspartierne og da navnlig Folkeflokken, som af Erhversmæssige Grunde, og Socialdemokratiet, som af sociale Grunde ønsker dansk kapital til Øerne, efterhaanden kunne indse, at kun ved at vide en forstaaende og venlig Holdning overfor Danmark vil de opnaa den økonomiske Hjælp, som de ønsker, ligesom de vil indse, at den Loyalitet, som Ordningen forudsætter, ikke blot skal udvises officielt, men ogsaa i Partiernes Presse og paa deres Møder.

.. Paa Linie med Tanken i nærværende Lovudkast vil en saadan Fremgangsmaade formelt være en Imødekommelse til Selvstyreønskerne, men reelt vil det bevirke en social- og erhvervspolitisk Kamp indenfor de færøske Partier om disse Midlers rette Anvendelse".

Endamálið var at brúka føroysku flokkarnar, at "bevirke en sosial- og erhvervspolitisk kamp" soleiðis at allar sjálvstýris røddir skuldu tagna í føroyskum politikki. Og tær flestu tagnaðu. Bara Tjóðveldisflokkurin helt og heldur fast við stríði fyri einum sjálvbjargnum og frælsum Føroyum.

Hetta er ikki einasta prógvi um, hvussu danska stjórnin brúkti føroysku flokkarnar, til at styrkja vald sítt í Føroyum.

Eitt annað dømi, sum eisini er vert at nevna, er tá Javnaðarflokkurin fekk fólkapensjónina at egna við. Her finnast eisini skjøl sum prógva at hetta var ein væl tilrætta løgd ætlan, ið Javnaðarflokkurin skuldi føra ígjøgnum í Føroyum, og aftur hesaferð var tað fyri at teppa sjálvstýrisrørsluna.

Í dag hava danir aftur brúk fyri Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum. Nú er tað tí, at Danmark vantast at siga ja, til ES grundlógina. Danska stjórnin veit væl, at tað eru ógreið løgfrøðilig viðurskifti millum Føroyar og Danmark. Hetta krevur, at tað verða knýttir nakrir nýggir knútar landanna millum. Teir hava hoyrt røddirnar úr Føroyum, ið siga, at føroyingar vilja yvirtaka øll málsøkið, tá danir lata síni fara til Brüssel.

Um 50 ár, fara vit enn eina ferð at lesa skjøl, ið prógva hvussu danir nú lumpaðu føroyingar. Hvussu teir fingu Løgtingið at samtykkja mál, ið tryggjaðu donsku stjórnina ímóti at skula lata málsøkir av hondum, ið hava avgerandi týdning fyri Danmark sum hjálandaveldi, og at tað vóru Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin sum vóru teir flokkar, ið gjørdu tað skitna arbeiði.

Alt hetta fær ein at hugsa — hvat munnu teir fáa afturfyri? Er tað nóg mikið hjá fólkaflokkinum at fáa slanguna í landskassan eftir studningi til privatu vinnuna? Og hvat man Javnaðarflokkurin fáa afturfyri? - livst so spyrst.

Tað hevði sømt seg betur fyri allar partar, um teir lótu allan henda iva koma Føroyum og Føroya fólki til góða.

Vælsignaðir bíðið við at taka so stórar avgerðir, yvir háls og herðar, tað skapar ótryggleika, og tað sømir seg ikki at fara fram, á ein so ódemokratiskan hátt.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst skilda tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.